Friðarligur føðingardagur hjá áttalingum

Einliga mamman, Nadya Suleman, ætlar at halda ein friðarligan føðingardag fyri teimum átta børnunum, sum hon føddi 26. januar í fjør. 34-ára gamla mamman átti framman undan seks børn, sum øll eru gitin kunstiga. Higartil hevur tað verið rímiliga lætt at ansa teimum átta børnunum, tí gtey hava ligið lutfalsliga still í teirra vøggum, men skjótt bara tey at ganga, og tá verður tað væntandi stríggi at ansa teimum, metir sakførarin hjá Nadyu Suleman, sambært ekstrablaðnum.

Omanlop á Syðradalsvegnum

Nógva regnið í gjár hevur havt við sær, at eitt omanlop hevur verið á Syðradalsvegnum, Streymoy, í morgun. Landsverk er á staðnum og ruddar vegin. Vegurin varð opin aftur sum vanligt eftir einum tíma. Tað var um hálvgunn 8-tíðina í morgun, at Landsverk fekk boð um, at grót var komið oman á Syðradalsvegin (Streymoy). Fólk frá Landsverki vóru á staðnum at rudda upp tað, ið komið var á vegin, so at ferðslan aftur kundi koyra sum vanligt.

Aksel tosar við suðuroyingar um læknarnar

Í næstu framtíð fer Aksel V. Johannesen at tosa við Suðuroyar Sjúkrahús og kommunulæknar í Suðuroynni um læknaligu støðuna í oynni

HEILSUVERKIÐ
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, fer nú at boða umboð fyri Suðuroyar Sjúkrahús og kommunulæknarnar í oynni á fund at tosa um læknaligu støðuna í oynni.

Tað sigur hann fyri Sosialinum.

Suðuroyingar stúra rættiliga illa fyri læknaligu støðuni í oynni. Læknar støðast ikki, tí arbeiðsbyrðan er ov stór og stúrt verður eisini fyri, at grundarlagið fer at verða máað undan Suðuroyar Sjúkrahúsi. Og hendir tað, dettur alt heilsuverkið í oynni sundur, tí so fer kommunulæknaskipanin eisini fyri bakka.

Hans Petur Nielsen, yvirlækni á Tvøroyri, segði við Sosialin í gjár, at læknarnir í Suðuroy hava gjørt eina framrættað loysn, sum hann málber seg.

Tað ber í sær, at narkosulækni verður sett í starv á Suðuroyar Sjúkrahúsi, saman við trimum yngru læknum, sum kunnu átaka sær arbeiði fyri kommunulæknarnar eftir klokkan 16 um dagin við serlæknum og kommunulæknum sum bakvakt.

Aksel ivast

Aksel V. Johannesen ivast í um, at hetta er besta loysnin, tá ið alt málið verður tikið í eini heild.

- Narkosulækni hevur ongantíð verið í Suðuroy og spurningur er um tað er grundarlag fyri at hava narkosulækna í fulltíðarstarvi á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Tað hevur heldur ikki víst seg at vera grundarlag fyri narkosulækna í fullum starvi í Klaksvík.

Hinvegin sigur landsstýrismaðurin, at arbeitt verður við at seta ein narkosulækna í næstu framtíð, sum skal hava skyldu til at at arbeiða á øllum trimum sjúkrahúsunum eftir tørvi.

Aksel V. Johannesen ivast eisini í um, at tað er besta loysnin at fáa yngri læknar til Suðuroyar.

- Yngri læknar, sum skulu fara til Suðuroyar, kosta einar 50.000-60.000 krónur um vikuna, so tað er ein serstakliga dýr loysn.

Kanna aðrar loysnir

Spurningurin er um tað ikki ber til at finna aðrar loysnir.

Landsstýrismaðurin sigur, at Suðuroyar Sjúkrahús hevur fingið 600.000 krónur afturat til at tryggja heilsutænastuna í Suðuroy, sum hann málber seg.

Og í næstum fer hann nú á fund við umboð fyri Suðuroyar Sjúkrahús og kommunulæknarnar í oynni um, hvussu hendan upphæddin verður brúkt best.

Hann ásannar at tað er rætt, sum fört verður fram, at Suðuroyggin kann fáa stórar trupulleikar í framtíðini við at manna læknaliðið í oynni.

Men hann sigur, at tað serliga eru kommunulæknarnir, sum hava trupulleikar, tí arbeiðsbyrðan er ov stór. Av tí sama er ringt at fáa teir at støðast, samstundis sum teir ið eru í starvi, eru farnir at eldast.

Lættir munandi um trýstið

Men í hesum sambandi verður arbeitt við at fáa Suðuroy upp í kommunulæknaskipanina fyri restina av landinum, har ein lækni situr á vakt Landssjúkrahúsinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð og avgreiður sjúklingar, sum hava ørindi hjá kommunulækna.

Landssýrismaðurin sigur, at hetta fer at hjálpa munandi.

- Ein heilt stórur partur av øllum viðtalum kunnu avgreiðast umvegis telefonina og tað fer at lætta munandi um trýstið á kommunulæknarnar í Suðuroynni.

- Royndir frá læknavaktini á miðstaðarøkinum vísa, at umleið helmingurin av viðtaluni kann avgreiðast umvegis telefonina.

Landsstýrismaðurin er sostatt ikki samdur við Hans Petur Nielsen, yvirlækna í Suðuroy, sum ikki sær stóra hjálp í hesum, tí kommunulæknar koma kortini at vera á vakt og at koyra til sjúklingar alla tíðina, sum læknavaktin ikki avgreiðir umvegis telefonina.

Yvirlæknin sigur eisini, at ein grund til, at tað er neyðugt at fáa yngri læknar á Suðuroyar Sjúkrahús, er at sum støðan er nú, fáa serlæknarnir ov stóra arbeiðsbyrðu av uppgávum, sum onki hevur við teirra serlæknaøki at gera.

- Tað er júst øll hesi viðurskiftini, ætlanin er at lýsa á ætlaða fundinum, sum verður í næstum við sjúkrahúsið og kommunulæknar í Suðuroy, har endamálið er at endavenda øllum viðkomandi spurningum.

Har er ætlanin at fáa innleggingartøl, tøl fyri, hvussu ofta, bakvaktin verður boðsend og tøl fyri akuttum innleggingum o.s.fr., so vit hava nakað ítøkiligt at halda okkum til, sigur Aksel V. Johannesen.

Bara ein tapari

Tey trý sjúkrahúsini í Føroyum minna mest um ein fótbóltskapping ímillum KÍ, HB og TB. Okkara avbjóðing er at fáa tey trý liðini at spæla saman sum eitt landslið, sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

HEILSUVERKIÐ
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

- Sum støðan ímillum tey trý sjúkrahúsini er nú, er bara ein tapari. Og tað er sjúklingurin.

Hóast nógvar ákoyringar seinastu dagarnar frá sjúkrahúsinum í Klaksvík og í Suðuroy, stendur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum fast um, at tey trý sjúkrahúsini skulu samstarva nógv meiri enn tey gera nú.

Og hann leggur dent á, at tað er ongin orsøk at stúra fyri, at tey smáu sjúkrahúsini fara at verða løgd undir Landssjúkrahúsið sum frá líður.

Tað er annars júst tað, sum bæði Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús eru bangin fyri, eftir at avgerð nú er tikin um at hereftir skulu tríggir leiðandi yvirlæknar á Landssjúkraúsinum hava fíggjarligu ábyrgdina av allari játtanina til serviðgerð uttanlands. Hendan játtanin umfatar eisini heimtøku av viðgerðum, har útlendskir serlækna koma til Føroya at viðgera súklingar.

Í hesum sambandi eru leiðreglur gjørdar fyri serviðgerð uttanlands og heimtøku, men tær hevur landsstýrismaðurin ikki góðkent enn og sostatt eru tær heldur ikki settar í verk.

Eftir leiðreglunum er tað heilsumáluráðið sum tekur avgerð um heimtøkur í hvørjum einstøkum føri.

Úr 30 niður í 3

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at tað er ikki Landssjúkrahúsið, sum skal hava ábyrgdina av játtanini til serviðgerð uttanlands, men tríggir leiðandi yvirlæknar. Yvirlæknarnir kring landið fáa eisini framyvir heimild at ávísa sjúklingar til viðgerð uttanlands og teir tríggir leiðandi yvirlæknarnir skulu ikki meta um hvønn einasta sjúkling, sum skal uttanlands.

Men teir fáa yvirskipaðu ábyrgdina av játtanini.

Aksel V. Johannesen sigur at áður hava tað verið 30-35 yvirlæknar, sum hava sent sjúklingar til serviðgerð uttanlands, men teir høvdu onga sum helst figgjarliga ábyrgd av játtanini og tí hevur verið sera tórfört at hava tamarhald á játtanini.

- Tað varð ov langt ímillum tey, sum vístu sjúklingar til serviðgerð uttanlands og tey, sum høvdu ábyrgdina av játtanini, sum var heilsumálaráðið og tí var neyðugt at fáa ábyrgdina fyri játtanina og heimildina at senda sjúklingar uttanlands, at fylgjast meiri at.

Tí verða tað tríggir leiðandi yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum sum fáa evstu ábyrgdina av játtanini.

Men landsstýrismaðurin staðfestir, at tað er undir ongum umstøðum ætlanin at steðga heimtøkuverkætlanum hjá teimum smáu sjúkrahúsunum.

Ongin orsøk at stúra

Samstundis skal ein samstarvsavtala gerast millum tey trý sjúkrahúsini og sum vit hava víst á í Sosialinum seinastu dagarnar, stúra tey bæði í Klaksvík og í Suðuroy fyri, at hetta fer so við og við at geva Landssjúkrahúsinum alt valdið yvir teimum smáum sjúkrahúsunum.

Í útjaðaranum halda tey rætt og slætt, at hetta fer at verða endin á Klaksvíkar- og Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Men Aksel V. Johannesen vissar um, at tað er grundarleyst.

- Vit hava trý sjúkrahús í Føroyum og tað er tann greiði politiski viljin at vit eisini framhaldandi skulu hava trý sjúkrahús, staðfestir hann.

Hinvegin er tann stóri trupulleikin, at virksemið á teimum trimum sjúkrahúsinum ikki er samskipað.

- Hetta minnir mest um eina fótbóltskapping ímillum TB, HB og KÍ. Men tað er ein kapping, har tað er ilt at fáa eyga á nakran vinnara.

- Hinvegin er bara ein stórur tapari og tað er áskoðarin, sum ikki fær tað fyri pengarnar, hann hevur krav upp á.

Landsstýrismaðurin sigur, at avbjóðingin verður at fáa tey trý sjúkrahúsini at spæla sum eitt landslið, so at vit fáa sum mest burtur úr hvørjari krónu, vit hvørt ár játta heilsuverkinum.

Aksel V. Johannesen vísur eisini til ABC samgonguskjalið, har tað stendur, at tey trý sjúkrahúsini skulu samskipast betri fyri at kunna virka sum ein eind, bæði við yvirskipaðari leiðslu og við at skipa tvørgangandi funktiónir ímillum sjúkrahúsini.

Tað stendur somuleiðis í samgonguskjalinum, at fastar mannagongdir skulu skipast um samskifti og samstarv um einstaka sjúklingin, ímillum sjúkrahúsini, kommunulæknar og Nærverkið.

Samgongan hevur eisini sett fær fyri at endurskoða reglarnar fyri ávísing til viðgerð uttanlands.

Skilir ikki trupulleikan

- Higartil hava vit sett eitt sjúkrahústjóraráð og ein strategiskan leiðslubólk, sum hava til uppgávu at samskipa samstarvið ímillum tey trý sjúkrahúsini, so at tey koma at virka sum ein eind og ikki sum trý, atskild sjúkrahús.

Í tí sambandi er ein samstarvsavtala gjørd, sum er ein rammuavtala fyri, hvussu samstarvið skal vera.

- Tá ið bæði sjúkrahúsið í Suðuroy og í Klaksvík stúra fyri, at hetta fer at niðurlagað smáu sjúkrahúsini,